HEILSUMÁLARÁÐIÐ

12. januar 2011
Mál:-/
Viðgjørt:MAS

## Samstarvsavtala

**Samstarvsavtala millum Suðuroyar Sjúkrahús, Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið í sambandi við at hjálparlækni er settur á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og at kommunulæknarnir í Suðuroynni gerast partur av Læknavaktini**

Málið við samstarvsavtaluni er at skipa samstarvið millum Suðuroyar Sjúkrahús, kommunulæknarnar í Suðuroynni og Læknavaktina.

Tá Suðuroyggin kemur við í Læknavaktina, skulu borgarar í oynni, ið hava tørv á læknahjálp uttan fyri vanliga arbeiðstíð, ringja til Læknavaktina. Ringjast kann til Læknavaktina gerandisdagar frá 16.00 – 08.00 og alt samdøgrið, vikuskifti og halgidagar.

Læknavaktin hevur telefonnummar 1870.

Kommunulæknarnir í Suðuroy luttaka í Læknavaktini sum koyrilæknar í Suðuroy og skipa seg sjálvi eftir vaktarskema við einum koyrilækni á vakt í senn. Tá vaktin byrjar, boðar koyrilæknin í Suðuroy frá til visitator á Læknavaktini, at viðkomandi hevur koyrivakt. Vaktarskema eigur at verða lagt nakað fram í tíðina. Heilsumálaráðið hevur ábyrgd av, at kommunulæknar eru í Suðuroy, sum kunnu taka koyrivakt.

Hjálparlæknin er settur í starv á Suðuroyar Sjúkrahúsi og hevur vakt á bráðfeingiseindini á sjúkrahúsinum. Hjálparlæknin hevur yvirlækna sum bakvakt. Hjálparlæknin kann tó eisini til eina og hvørja tíð, ráðføra seg við vistierandi kommunulækna í Læknavaktini ella við koyrilæknan í oynni.

Sjúklingar sum venda sær óvisiteraðir til Suðuroyar Sjúkrahús, kunnu verða bidnir um fyrst at ringja til Læknavaktinaa á 1870 til avgreiðslu ella visitatión.

Tá borgarar ringja til Læknavaktina, hevur visiterandi kommunulæknin hesar møguleikar:

- Avgreiða sjúklingin umvegis telefonina
- Visitera til Suðuroyar Sjúkrahúsi
- Visitera til koyrivaktina í Suðuroynni

Kommunulæknin, bæði visiterandi og koyrilæknin, hava óskerdan ávísingarrætt innan Heilsuverk Føroya.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn

Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Meginreglan innan sentrala visitatión er, at tá visitator hevur visiterað ein sjúkling umvegis telefon til koyrilækna ella Suðuroyar Sjúkrahús, so er visitator "leysur" av sjúklinginum og hevur latið ábyrgdina fyri sjúklinginum yvir til viðkomandi lækna, hann hevur visiterað til.

Margit Stórá, fulltrúi

Góðkent: 12. januar 2011

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í Heilsumálum:____________________

Poul Geert Hansen, aðalstjóri:____________________

Ronnie Midjord, sjúkrahússtjóri Suðuroyar Sjúkrahús:____________________

Jaspur Petersen, formaður í Kommunulæknafelag Føroya:____________________